# NORÐURLENDSKI STATURIN SKAL BJÓÐA HINUM AV



**GUNNAR WETTERBERG**, SVENSKUR SØGUFRØÐINGUR, ER SANNFØRDUR UM, AT TAÐ BARA ERU **FYRIMUNUR** VIÐ AT **KNÝTA** SVØRÍKI, NOREGI, FINNLAND, DANMARK OG ÍSLAND Í EITT **NORÐURLENDSKT** SAMVELDISRÍKI



SAMVELDI

Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo

Tað var í oktober í fjør, at svenski søgufrøðingurin og debatørurin Gunnar Wetterberg setti sítt seinasta punktum í argandi kronikk, sum dagblaðið Dagens Nyheter skuldi prenta. Evnið var, hvussu Norðurlond skulu skipa seg í framtíðini.

Lítið visti Gunnar Wetterberg, tá hann sendi kronikkina umvegis teldupost til ábyrgdarblaðstjóran á Dagens Nyheter, at hann, nakrar fáar dagar seinni, skuldi verða millum mest umrøddu menninar millum norðurlendsku politikarar.

Forsætisráðharrar viðgjørdu spurningin, sum Wetterberg setti. Ítøkiliga skeyt søgufrøðingurin upp at skipa eina samgongu millum Svøríki, Finnland, Noregi, Danmark og Ísland.

## Størri altjóða virðing

Gunnar Wetterberg var sannførdur í sínari kronikk. Tað eru bara fyrimunir við at knýta norðurlendsku statirnar, Svøríki, Noregi, Finnland, Danmark og Ísland í eitt norðurlendskt samveldisríki. Tað skal skipast eftir sama leisti sum Ongland, Frakland, Spania, Týskland og Italia. Hann skeyt eisini upp, mest í spølni, at Keypmannahavn verður høvuðsstaður, og at Margretha drotning skal vera ríkisovasti.

Tað er so upplagt, vildi hann vera við. Norðurlendingar, og serliga skandinavar, skilja væl hvønn annan, umframt at mentanin líkist. Norðurlond eru hvørt sær tannleysar pinkutjóðir, sum hava ilt við at gera seg galdandi í altjóða hópi. Eitt norðurlendskt samveldisríki hevði, sambært Gunnari Wetterberg, staðið nógv sterkari, enn tjóðirnar gera sum sjálvstøðugar. Við 25 milliónum íbúgvum og tíggjundu størstu bruttotjóðarúrtøkuni í heiminum hevði eitt norðurlendskt samveldisríki fingið nógv størri altjóða virðing.

## Felags lóggávu

Wetterberg útgreinar ikki, hvønn leiklut Føroyar, Áland og Grønland skulu hava í norðurlendska samstarvinum. Wetterberg hugsar bara um fimm norðurlendsku statirnar.

- Samstarvið millum norrønu stjórnirnar hevur ikki verið tætt seinastu árini. Tað skal broytast. Tað eru fleiri dømi um, at vinnulívið í Norðurlondum arbeiðir um landamørk, og tað er upplagt, at norrønu londini fremst av øllum skipa eina felags lóggávu á vinnulívsøkinum og á arbeiðsmarknaðinum, sigur Gunnar Wetterberg.

## Stórt samveldi

Wetterberg helt fyrilestur í Norðurlandahúsinum í síðstu viku um sítt hugskot at skipa Svøríki, Noregi, Finnland, Danmark og Ísland í eitt norðurlendskt samveldi. Hann grundgav bjartskygdur fyri fyrimununum og møguleikunum og vísti á, at norðurlond tilsamans eru 25 milliónir fólk, og búskaparliga hevði samgongan verið størri enn Russland og Brasil. Hann legði dent á, at norðurlond hava somu grundvirði við denti á fólkaræði, javnstøðu, samhaldsfestni og vælferðarskipanir. - Í uttanríkispolitikki kunnu norðurlond sum ein samgonga fáa ein stóran leiklut í heimspolitikki, segði Wetterberg, uttan tó at vísa ítøkiliga á, hvussu viðurskiftini við ES skulu verða.

- Eitt slíkt samveldi verður neyvan skipað næstu árini. Eg giti, at tað verður aktuelt um 20 ár. Tað krevur eitt drúgt kanningararbeiði og samráðingar um ymsu viðurskiftini, sum skulu fáast í rættlag fyrst.

## Norðurlendsk mótstøða

Norðurlendsku forsætisráðharrarnir og fleiri norrønir politikarar, hava fyribils tikið frástøðu frá hugskotinum hjá Gunnari Wetterberg. Hugsjónin hevur fingið nógv pláss í kjakrúminum. Debatørurin gav út bóklingin 'Forbundsstaten Norden', sum snýr seg um sínar tankar við norðurlendska statinum.

Ein kanning, sum norðurlendska ráðharraráðið hevur gjørt, vísir, at fólkið í norðurlondum tekur undir við størri samstarvi, men tað stúrir samstundis fyri at missa samleikan og nærdemokratiið í einum tættari samstarvi.